BINGO
verður í kappróðrarneystinum í Streymnesi mánakvøldið 4.apríl kl. 19.00. Øll eru vælkomin.
H.S.R.

GOTT BINGO
verður í Róðrarneystinum á Argjum hósdagin 31. mars kl. 19.00. 6.-12. spæl gávukort á 600,- frá FK. Á lutaseðli m.a. Apex ferðaseðil, eykaspæl, koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Argja Róðrarfelag

LOPPUMARKNA INNSAMLING
Vit samlað til nýtt neyst og nýggjan bát og vilja tí heita á tykkum um at hjálpa okkum við at samla inn til loppumarknað. Øll ting, stór og smá, hava áhuga. Tit ringja, vit avheinta tað. Róðrafelagið Knørrur.
Tlf. 310055 ella 250118

Bøkur

YNSKIST TIL KEYPS
Tað hevði frøtt meg, um tað er nakar ið vil selja mær Ævintýrbókina Grimm. Myndir: Svend Otto S. Føroya Lærarafelag 1989.
Tlf. 584445

FØROYA SIGLINGARSØGA TIL SØLU
13 bind av Føroya Siglingarsøgu til sølu fyri 1.000 kr. (nýprísur 2.200 kr.) Hevur hetta tín áhugað, kannst tú ringja til tlf. 509547 ella senda ein t-post til
livsvirdi@hotmail.com

Burturm. /funnið

EITT DIGITALT FOTOTÓL
er funnið í busskýlinum í Skálabotni 25. mars. Kann avheintast á Statoil.
Tlf. 441200

TANN,
sum tók mín nýggja hatt í Rex mikukvøldið tann 23. mars, verður vinarliga biðin um at ringja 225588, so vit kunnu avtala, hvussu eg kann fáa hann aftur. Hevur stóran týdning fyri meg.
Tlf. 424304 ella 227004

GRÁ KETTA BURTURBLIVIN
Grá ketta, lítil á vøkstri við hvítari høku, bringu og labbum er burturblivin. Um tú veitst nakað um okkara kettu, ella hevur sæð hana, vinarligast sig okkum frá á
Tlf. 322242 ella 253766

GANI VIÐ TONNUM
Funnin við Leitisvatn
Tlf. 214262

Býli í Føroyum

ÍBÚÐ ELLA KAMAR
til leigu í fýra mánaðir. Nú eg skal í starvsvenjing av heilsuskúlanum í Suðuroy, verður søkt eftir lítlari íbúð ella kamari til leigu í Havn í tíðarsskeiðnum 11. apríl til 15. august. Eg hvørki royki ella drekki og eg gjaldi til tíðina
Tlf. 265794

HÚS Í TOFTALÍÐ
í Vági til leigu frá 15. apríl.
Tlf. 320354 áðrenn kl. 15

ÍBÚÐ TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst, er góð íbúð til sølu á Norðurhædd í Saltangará. Íbúðin er eitt ár, stendur í friðarligum umhvørvi við sera góðum útsýni yvir Skálafjørðin.
Tlf. 449933/222566

ÍBÚÐ TIL LEIGU
til einligt mannfólk beinanvegin.
Tlf. 310352

KAMAR
í miðbýnum til leigu frá 1. apríl. Atgongd til køk, bað og vaskimaskinu. Sera friðarligt umhvørvi.
Tlf. 583576

HÚS YNSKIST TIL LEIGU
Hús v/ min. 4 kømurum ynskist til leigu í Havn, á Argjum ella í Hoyvík frá 1.7.05 ella 1.8.05.
Tlf. 504026 eftir kl. 18

ÍBÚÐ YNSKIST
Friðarlig ung hjún (uttan børn) søkja íbúð í Tórshavn fyri sámuligan prís. Vit hvørki roykja ella drekka, og fara væl um.
Tlf. 251343 - email: JF@email.fo

GÓÐ ÍBÚÐ
í stovuhædd til leigu til fólk í føstum starvi. Stova og køkur í einum, tvey kømur og baðiverilsi. Kr. 4500,- við hita. Depositum verður kravt.
Tlf. 424304/227004

ÍBÚÐ Í HOYVÍK YNSKIST
til leigu til tvey fólk.
Tlf. 224411

FRIÐARLIGT PAR
í 20'unum søkja hús/íbúð í Havn, hava fast arbeiði og gjalda til tíðina.
Vinarliga ringið 256307

HÚS Í SØRVÁGI TIL SØLU
Handilshøli 100 fermetrar - íbúð 60 fermetrar. Húsini hava stórar møguleikar til ymisk endamál t.d. handil, klinik, kaffistovu o.l. Verða seld um nøktandi boð fæst.
Tlf. 532614 ella 512914

ÍBÚÐ Í HAVN TIL LEIGU
Køkur og stova í einum, 1 sovikamar, bað og gongd, vælegnað til 1 ella 2 fólk. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 2053/1

HÚS TIL SØLU
Eldri sethús í Rituvík til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 581655

HÚS Í LEIRVÍK TIL LEIGU
Til ikki roykjarar. Frá 15 apríl. Prísur 4500,- um mánaðin.
Tlf. 443087 ella 220755

KAMAR Í VESTURBÝNUM
Til leigu við øllum hentleikum, nær læraraskúlanum. Vinarliga ring
Tlf. 514765

BYTTE HUS I UGE 29 OG 30
Vi er en familie på tre i Løgumkloster í Sønderjylland, der gerne vil bytte hus med en familie i Strendur eller omegn i uge 29 og 30. Løgumkloster ligger i vest Sønderjylland, der er ca. 20 km. til den tyske grænse. Vores hus ligger tæt ved skov og å. Vi har ca 40 km til stranden på Rømø og ca 45 km til østkysten, hvor der også er bademuligheder. Kontakt os hvis det har interesse på
Tlf. 0045 74744134

HÚS/ÍBÚÐ Í VESTMANNA
Ynskjast til keyps/leigu skjótast gjørligt.
Tlf. 251319 ella 508805

ÍBÚÐ YNSKIST Í HAVN
Eg eri ein 2 ára gamal drongur. Mamma mín er byrja at lesa sjúkrarøktarfrøði og tí søkja vit eftir eini íbúð í Havn. Um tú kanst hjálpa okkum, so vinarliga ring á
Tlf. 255511

SKAL TÚ TIL HAVNAR
Og vil búgva væl, so er møblerað íbúð til leigu. 112 fermetrar við øllum hentleikum, vikuskifti ella styttri tíð. 700 kr um dagin, seingjaklæðir 50 kr.
Tlf. 218664

HØLI YNSKAST
Í 4-6 mánaðir at seta ein seksæring í, í Streymoy, Eysturoy ella Vágoy. Prísuppskot: uml. Kr. 500,- pr. mánaða.
Tfl. 31 67 80 ella 21 87 80

SUMMARHÚS VIÐ GJÓGV
Til leigu, allir vanligir hentleikar eru í húsinum.
Tlf. 421305 ella 721305

HÚS TIL SØLU
Í Sørvági um hóskandi boð fæst.
Tlf. 257678

ÍBÚÐ
Ein 1 1/2 rúms íbúð í miðbýnum til leigu.
Tlf. 320566

2 KØMUR TIL LEIGU Í HAVN
Fyri 1.800 og 2.500 kr. við atgongd til køk, bað, wc og møguleika fyri interneti. Emaila til vestergaard@hotmail. com ella ring
Tlf. 269294

Býli uttanlands

TIL LONDON Í SUMMAR?
Íbúð til leigu frá juni til august.
Tlf. 448215

ÍBÚÐ Í KBH. YNSKIST TIL LEIGU
Um ynskist kunnu vit útvega íbúð í Tórshavn, treytað av leiguumbýti.
Tlf. 216030/313339

FERÐAST Í KBH
Møblera íbúÐ, 67m2 v.teldu/internet til leigu í KBH í 10 dagar: 27apr-07mai. 2500 kr Ring
Tlf 0045 2734 2394

ER TAÐ NAKAR
Sum vil leiga okkum eina íbúð í keypmannahavn. Vit eru 2 vaksin og 1 barn. Vinarliga ring
Tlf. 0045 96940072

2 V. ÍBÚÐ Í KBH
Til framleigu frá 1. apr. til 30. juni. Nærri upplýsingar á
Tlf. 0098 27591057

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
Maður, kvinna og barn ynskja møblerøða íbúð til framleigu frá aug/sept. 05 og hálvt ár fram, ella longri. Ring
Tlf. 223047 Teresa

Dansur

ARGENTINSKUR TANGO
Við Maritu og Adrian úr Buenos Aires verður 22.-24. apríl. Upplýsingar á t-post: alwinther@hotmail.com ella
Tlf. 267757

Dýr

SMÁHUNDADAGUR Í HOYDØLUM
Leygardagin 16. apríl kl. 16.00 verður smáhundadagur á plenuni frammanfyri studentaskúlan í Hoydølum. Endamálið er at skapa eventuelt samband millum smáhundaeigarar á ein ella annan hátt. Hundarnir skulu helst ikki vera størri enn 15 kg. Hanna, Diana og Vár. Spurningar? Ring til
Honnu 211413
ella Dianu 266553

TIL SØLU
2 marsvín við búri fyri 400 kr.
Tlf. 317113

HVØLPAR UNDAN BORDER COLLIE
Raska, Kurla, Flekka og Oddur eita gløggu og góðu hvølparnir.
Ring 214271 - Bjørt Samuelsen

ÍRSKUR HESTUR TIL SØLU
Ein 11 ára gamal írskur hestur til sølu. Nógv ting fylgja við og selist til vandan ríðara. Hann um miðjan apríl. Hann stendur í Sandavági og er ikki til útláns!
Ring og hoyr nærri á tlf 504072

6 VIKUR GAMLIR HUNDAHVØLPAR TIL SØLU
Mamman er ekta labrador (hevur stamtalvu) og pápin er blandaður labrador og bordercollie, ógvuliga vakrir og barnavinarligir.
Tlf 333118 og 533118

TIL SØLU
Ein hamstari við býri bílig til sølu.
Tlf. 313942 ella 253369

EG ERI EIN 8 VIKUR GAMAL REYÐUR OG HVÍTUR KETTLINGUR
(Frensur) sum eri klárur at flyta heimanífrá um 2 vikur. Dugi at eta/leppa, eri reinligur. Er tú djóravinur, ring
Tlf. 318824 ella 270087

EIN GOLDEN RETRIVER
Verður latin vegna serligar umstøðir. Er 1 ár og ótrúliga fitt og góð við børn. Bert til 100% djóravin.
Tlf. 442828

DVØRGHAMSTARAUNGAR
Vit eru 5 ungar, ið fegnir vildu fingið eitt gott heim. Vit seljast fyri 20 kr. stk. Vit eru flytiklárir. Ringi
tlf. 504085 ella 318269

TRÝ ÁRA GAMAL STUTTHÁRAÐUR HØSNAHUNDUR
Stórur, verður latin vegna serliga umstøður. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 441559 ella 211559

EIN SERA FITTUR HUNDAHVØLPUR
Kann latast beinanveg til djóravin (tík).
Tlf. 422488 ella 226414

KANIN FUNNIN
Ein grá kanin við hangoyrum funnin á Agjum
Tlf. 314270

KETTA/STÓRUR KETTLINGUR YVIRKOYRDUR
Og deyður í J.C. Svabosgøtu við Landsbókasavnið 18/3-05. Hann er gráur og hvítur. Hann er gráur um trýnið, pannuna, oyruni, ryggin, afturbeinini og halan. Hann er hvítur um kjálkarnar, hálsin, bringuna, forbeinini og allar fýra podir. Ring
Tlf. 31 14 30

TIL SØLU
1 stórt búr til marsvín v/fløsku, matskál, brúgv o.ø.
Tlf. 210382

TIL SØLU
Tvær skotagimbrar blakkar til sølu
Tlf. 741225

Fartelefonir

EIN NOKIA YNSKIST
Ein Nokia 3200, 6220, 6610, 7250 ella 6230 ynskist til keyps.
Tlf. 522288

NOKIA 3220
3 mánaðar gomul Nokia 3220 við myndatóli til sølu fyri 1000,-
Ring á 261632 ella 223447

MOTOROLA A920 3G FARTELEFON
Telefonin hevur stóran skerm við fingertouch display. Hevur nógvar møguleikar, m.a. GPS, kamera, film, USB kagal, kalendara. Danskur prísur 5.871 kr. Til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 214163

FARTELEFON
Nokia 6100, sindur yvir 1 ára gomul, við nógvum spølum og við WAP-funktión. Kostaði uml. 1900 kr. sum nýgg, til sølu fyri 900,- kr.
Tlf. 0045 86448627/0045 26747474

Fundir

GLAUKOS
Aðalfundurin hjá felagnum Glaukos verður leygardagin 2. apríl.
Nevndin

FUNDUR
1) Skipað verður fyri fundi í skúlanum 6. apríl kl. 21.00. At endurstovna Árnafjarða Róðrarfelag. 2) Nýggjar lógir. 3) Val av nevnd. 4) Ymiskt.
Fyrireikararnir

ÁRSAÐALFUNDUR
fyri limum felagsins, verður í Árnafirði 6. apríl 2005 kl. 20.00. Skrá samb. lógum felagsins.
Bygdarfelagið Báran

ÁRSAÐALFUNDUR
verður í Framtíðini leygardagin 9. apríl kl. 17.00. Skrá sambært lógum felagsins.
Arbeiðsmannafelagið Framtíðin

AÐALFUNDUR HJÁ FOSTURFORELDRAFELAGNUM
Fosturforeldrafelagið hevur aðalfund á Tórshavnar Sjómansheimi leygardagin 9. apríl kl. 9.30. Skrá sambært lóg felagsins. Greitt verður frá komandi Barnaforsorgarlóg og Hans Mourits Foldbo heldur fyrilestur um evnið: Hvussu stýra vit okkara vreiði.
Nevndin

BÁTAFELAGIÐ Á BAKKA
Ársaðalfundur verður sunnudagin 24. apríl kl. 17.00.
Nevndin

SUÐUROYAR VINNURÁÐ
Stovnandi aðalfundur verður Ónsdagin 13. apríl. Tíð og stað verða lýst seinri. Meiri fæst at vita við at ringja á tlf. 372470 og 504938 ella senda teldupost til jon@auxilior.com

AÐALFUNDUR
Árligi aðalfundurin hjá Havnar Sjónleikarfelag verður í Sjónleikarhúsinum flaggdagin 25. apríl 2005 kl. 17.00.
Havnar Sjónleikarfelag

CØLIAKIFELAG FØROYA
Aðalfundur verður 17. apríl 2005 kl. 15.00 í MBFhúsinum, Íslandsvegur 10, Tórshavn. Skrá sambært lógum felagsins.
Nevndin

Húsarhaldstól

KOMFÝRUR TIL SØLU
Ein AEG el-komfýrur til sølu fyri 1.500,-
Tlf. 314575

FRYSTISKÁP YNSKIST
Er tað nakar, ið hevur eitt frystiskáp at selja okkum bíliga.
Tlf. 521430/321430

BRÚKT VASKIMASKINA
ynskist bíliga til keyps, merki onki at siga, men skal tó vera í góðum standi.
Tlf. 220744

TIL SØLU
Frystiboks 350 l. Bíliga til sølu. Køliskáp 60x60x85. Bíliga til sølu. Køliskáp við glashurð 60x60x183. Bíliga til sølu.
Tlf. 424304 ella 227004

TIL SØLU
Komfýrur, lítið brúktur, eitt ár.
Tlf. 422147/722147

VEGNA FLYTING
Verður ein fittlig vaskimaskina av slagnum HOOVER HTR 243 seld. Kan setast til hondvask. Hevur hjól. Mát: 89x40x60cm. Nógv ymisk vaskiprogrammir. Prísur: 3000,-
Tlf. 281020

VEGNA FLYTING
Verður selt eitt 1 ára gamalt frýstiskáp av slagnum Haier HF 116, tekur 85 L. Mát: 85x60x55cm. Brúkar lítla orku (orkuklassi A). Í sera góðum standi. Prísur: 1000,-
Tlf. 281020

Innbúgv

YMIST TIL SØLU
Sofaborð,
leðurstólur svart,
hornaborð til teldu,
leðursofa svart 2,5,
køksborð stórt, 6 stólar,
tennisketsjari,
badmintonketsjari,
2 skápshurðar 49 x 132,
song boxmadrass 90 x 200 (180 x 200),
song boxmadrass 80 x 200,
kontórborð. Bíliga til sølu.
Tlf. 224910

YNSKIST
5 innhurðar v/ karmi, brúktar, helst slættar, men hettar er tó ikki ein treyt, og um tær eru hvítar ger tað tær ikki verri.
Tlf. 220744

YNSKIST
Hvít wc-kumma ynskist bíliga til keyps, snið hevur ikki so nógv at siga, men skal tó vera í góðum standi.
Tlf. 220744

SONG TIL SØLU
Ein 1 ára gomul stálsong 140 x 200 við madrassu til sølu fyri 800 kr. Er í sera góðum standi.
Tlf. 581782

GAMAL ÚTSKORIN SKENKUR
500 kr.
Lítið sofaborð, útskorin bein 250 kr.
Gomul ljósakrúna 500 kr.
Tlf. 319964

TIL SØLU
Hvítt antikkborð frá Mango mát 70 x 160 + 4 stólar í sama stíli. Nýprísur 5.700 kr. Til sølu fyri 3.800 kr.
Ein nett hvíttmálað hornasofa, klødd við stót 210 x 210 til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 311702 ella 222767

FLOT GULVSPEJL
Stort flot gulvspejl på fod i mahogni. Selve spejlet er ovalt og vippebart. højden152 breden 58, pris 700,-
Tlf. 448597/748597

YMIST TIL SØLU
Sovisofa, kann gerast dupult, fura, betrekk blátt/hvítt
Gongsmøbil 73x40, spegl 65x120, fura.
Náttborð við skuffu, hvítt.
Køksborð, ovalt við stálbeinum 80x130sofaborð, bók við svartari plátu 60x100 bambus, foldigardin myrkar, 60x170.
Tlf. 317337

LEÐURSOFASETT
Svart leðursofasett 1+2+3 bíliga til sølu. Svart reolsystem í trimum sektiónum, skáp við innbygdum ljósi. Bíliga til sølu.
Tlf. 424304 ella 227004

HILLASYSTEM
myrkt hillasystem 3 sekt.til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 332847/257647

TIL SØLU
Nakað av steintoyi: tallerkar, koppar o.a. Væl egnað til felagshølir ella líkn. Møguleiki er at frætta meira á
Tlf. 375459 ella 215459

TIL SØLU VEGNA FLYTING
Reolsystem úr myrkum træi bíliga til sølu. 4 sektiónir á 89 cm.
1 longd, 2 hava yvirskáp við glashurðum.
2 bókareolir á 150 kr.
1 kommoda 150 kr.
Tlf. 212485

SEINGJATEPPI
Vi 2 pútum til sølu. Nýprísur 1.350 kr. Nú 350 kr.
Tlf. 311902 ella 227513

5 ARMA LJÓSAKRÚNA TIL SØU
Nýprísir 1.250 kr. Nú 300 kr.
Tlf.311902 ella 227513

TVEIR HVÍTIR TRÆDISKAR
Við yvirbygningi, og glas huðrum. Ein svørt leður hornasofa. Og eitt sett av strámøblum.
Tlf. 210505 ella 318485

YNSKIST
Tveir lenistólar (í gomlum sniði) ynskjast til keyps. Vinarliga ring á
Tlf. 422211 ella 583013

HEINGIKOYGGJA
Ynskist
Tlf. 441790

TIL SØLU
1 telduborð (sum nýtt) 1 standilampa, 1 sovisofa og 1 ungdómsborð.
tlf. 310384 ella 210382

GRATIS TILBOÐ
Vegna umbygging og plásstrot havi eina sovisofu 210x90, sofaborð og eitt vælviðarið hyllasystem við 4 skápum (4 rekkir) úr teak. Ring
Tlf. 313385 ella 513385

Lutaseðlar

MÁLNINGAFRAMSÝNINGIN Á PÁSKUM
Høvuðsvinningur á atgongumerki nr. 292. Aðrir vinningar:
1) nr. 27290. 2) 27395. 3) 27451. 4) 22100. 5) 22283. 6) 22173.
Allir vinningarnir eru avheintaðir. Lions Club Eysturoy takkar fyri vitjanina.
Lions Club Eysturoy

HETTA VÓRU VINNINGARNIR
Í samband við Stulskonsertina sum skuldi verða í Missiónshúsinum á Glyvrum (men bleiv avlýst vegna sjúku).
1. amboð frá Højgaard handilsvirki nr. 2509, heinta
2. Laksur 4680
3. Turt tjógv 28095 heinta
4. Kassi sodavatn 1695 heinta
5. Ræstan fisk 3942 heinta
6. Laks 3887 heinta
7. Turran fisk 2851
8. Gávukort frá Búnýti 3939 heinta.
Vinningarnir fáast við at ringja Jóhannu tlf. 222268, Thordis tlf. 258352. Best eftir kl. 18. Takk fyri stuðulin.
KFUM-skótarnir á Glyvrum

Matur

KEYPIÐ FØROYSKT!
Vælsmakkandi neytakjøt til sølu. Kjøtið er sundurskorið og vakumpakkað, verður selt í fjórðingum, ið viga uml. 40-60 kg. Bílegging á tlf. 211839/441839.
Martin á Fløghamri

YNSKIST
Ræst kjøt ynskist til keyps.
Tlf. 212358

Pløgg

NÝGGIR NIKE RENNISKÓGVAR TIL SØLU
Vegna feilkeyp. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 514765